# a ein deyðsfella



*- Tað er ikki so lítil avbjóðing at byggja eitt lítið skip eftir sama leisti, sum ein stórur trolari, sigur Thormund Johannesen, skipsverkfrøðingur*

fríum stáli, hevur tríggjar forðingar fyri, at sjógvur kann koma inn í skipið.

- Fiskahagreiðingin fer sostatt fram undir heilt lokaðum dekki – og trolarbeiði verður gjørt uppi á høgtliggjandi tryggum dekki, har sjógvur at kalla ikki kemur at.

### Lítil larmur…

Á eldri skipum kann larma so illa, at menn við tíðini fáa skaða á hoyrnina.

- Men fyri at minka um larmin umborð á nýggju trolbátunum, eru bæði høvuðsmotorur og hjálpimotorarnir settir á gummipútur. Í manningarrúmunum er dúrkið lagt sum sokallað flótandi dúrk, soleiðis at tann motorlarmur, sum flytir seg gjøgnum stálskrokkin, ikki skal gera so nógv um seg í apteringini.

Skipsverkfrøðingurin vísir á, at tann vælbjálvaða lastin og bjálvingin í dekkinum yvir maskinrúminum kemur eisini at gera sítt til, at motorlarmurin verður minni frammi í kryvjirúminum – og serliga í manningarrúminum.

Hann sigur, at tilfarið, sum manningarrúmini verða smíðaði úr, er plátur, klæddar við sokallaðum F-laminati. Hetta verður gjørt fyri, at eldur ikki skal festa í og breiða seg.

- Uppgongin úr apteringini upp á brúnna er lokað inni í stálskakt við brandtryggari hurð, soleiðis at brúgvin og harvið manøvra og samskifti er væl tryggjað, um eldur skuldi fest í niðri í manningarrúmunum.

Thormund vísir á, at tey bæði fremru manningarkømrini eru eisini skild frá restini av apteringini við tvørskips stálskotti og brandtryggum hurðum.

- So, um manningin liggur og svevur, meðan skiparin er einsamallur á brúnni, eru teir vardir, um eldur eitt nú skuldi fest í galluna. Undir slíkum umstøðum kunnu teir koma sær upp á dekkið gjøgnum neyðútgongd.

### Góðar umstøður

Um arbeiðsumstøðurnar annars umborð, sigur skipsverkfrøðingurin, at í kryvjirúminum kemur fiskurin úr móttøkupavninum í arbeiðshædd til menninar, sum standa og kryvja í vaskipavnar, haðani fiskurin eftir flutningsbandi fer víðari niður í lastina, sum er klødd við rustfríum stáli – bæði á banjara, skipssíðum og skottum.

- Garneringin í lastini er soleiðis háttað, at kassalongdir og kassabreiddir "ganga upp" allar vegir. Hetta saman við, at ongar stúttur eru í lastini, ger, at arbeiðsumstøðurnar eru sera góðar.

Hann sigur, at á brúgvatakinum er sokallaður rullidoyvitangi. Haraftrat hava skipini eisini teir vælvirkandi dupultu og opnu slengrikjølarnar undir botninum á skipinum. Tó eru hesir – sum nakað nýtt – gjørdir væl longri enn vanligt; teir røkka nevniliga næstan heilt aftur á reyvina á skipunum.

Í aðrar mátar hevur eisini verið hugsað um umhvørvið umborð á nýggju trolbátunum.

- Øll luftrør frá oljutangum eru løgd til ein felags yvirflotstanga við alarmi og síðan niður í dagtangan, sum – áðrenn bunkrað verður – skal sleppast niður í ein av botntangunum. Á henda hátt er eingin vandi fyri, at olja flýtur út á dekkið og síðan á sjógv, tá ið bunkrað verður, sigur Thormund.

### Góð ynskir

Skipsverkfrøðingurin vísir í greinini á, at treytin fyri, at skipaflotin verður endurnýggjaður, er sjálvandi, at tey nýggjaru skipini standa seg fíggjarliga.

- Tí er tað at vóna, at hesir trolbátar, sum nú verða smíðaðir á Tórshavnar Skipasmiðju – og somuleiðis onnur nýggj skip, sum koma inn í flotan – fara at bera seg. Hetta vil betra munandi um bæði trygd og trivna hjá okkara sjófólki, sigur Thormund Johannesen at enda.



# Thor ætlar at byggja privata atløgubryggju

**Felagið, Thor í Hósvík, hevur søkt Sunda kommunu um loyvi at byggja 120 metrar av atløgusíðu í Hósvík. Í næstum verða samráðingarnar millum kommununa og reiðaríið um treytirnar fyri hesi verkætlan**

BYGGING

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Thor í Hósvík hevur søkt Sunda kommunu um loyvi at byggja eina 120 metra langa atløgubryggju í Hósvík. Í umsóknini sigur felagið seg vilja rinda kostnaðin av hesum arbeiði.

Fíggjarnevndin í Sunda kommunu hevur samtykt at leggja málið fyri bygdaráðið, og á seinasta bygdaráðsfundi, sum var 14. mars, samtykti Sunda kommuna einmælt, at borgarstjórin, sum er Heðin Zachariassen, tekur upp samráðingar við Thor um sáttmála millum felagið og kommununa.

Tá ið samráðingarnar eru lidnar, verður uppskotið aftur lagt fyri bygdaráðið til endaliga støðutakan.

Á fundinum, 14. mars, samtykti bygdaráðið eisini, at treytirnar, sum álagdar verða reiðarínum, prinsipielt eiga at verða tær somu, sum kommunan álegði Løve Betong, tá ið felagið fyri nøkrum árum síðan bygdi atløgubryggju á Norðskála. Tó heldur kommunan, at avdráttrartíðin, sum Thor fær, kann verða longri enn hjá Løve Betong, tí felagið ikki sparir nakað serligt vørugjald, sum sagt verður í samtyktini.

Av øðrum treytum, sum Sunda kommuna setir, er, at kommunan setir ein eftirlitsmann, sum byggiharrin rindar. Í sáttmálanum skulu eisini verða afturkeypstreytir, um kommunan ynskir at siga sáttmálan upp – og somuleiðis vil kommunan tryggja sær, at onnur skip skulu kunna brúka bryggjukantin, tá ið hann er tøkur. At enda tryggjar Sunda kommuna sær eisini, at skip við asfalti kunnu leggja til bryggjukantin, sum Thor ætlar sær at byggja.

### Privatar havnir

Skrivarin í Sunda kommunu, Jens Dalsgaard, sigur, at tá ið Løve Betong bygdi atløgubryggjuna á Norðskála, snúði sáttmálin við felagið seg um 5 ár, soleiðis at kommunan yvirtekur bryggjuna aftur í hesum árinum, nú 5 ár verða liðin, síðan byggingin varð framd.

- Tað er kanska ikki so vanligt í Føroyum við privatum havnum ella bryggjum, men í Noregi er hetta rættiliga vanligt.

Hann vísir á, at í Reykjavík hevur Eimskip eisini sína bryggju og sítt havnaøkið, sum bert skipini hjá felagnum nýta.

Hann heldur, at okkurt dømi eisini er í Føroyum um privatar bryggjur, eitt nú í Fuglafirði, har Havsbrún hevur gjørt íløgur í havnalagið.

- Í slíkum førum rekur felagið atløgubryggjuna, soleingi sáttmálin er galdandi, og tá ið so sáttmálin sambært avtaluni gongur út, yvirtekur kommunan bryggjuna.

### Endalig støðutakan

Kommunuskrivarin vísir á, at enn er eingin sáttmáli gjørdur við reiðaríið í Hósvík, men vísir til samtyktina, sum sigur, at kommunustýrið einmælt er positivt sinnað at lata felagið byggja atløgubryggjuna.

Jens Dalsgaard sigur, at væntandi verða samráðingar í næstum millum reiðaríið í Hósvík og borgarstjóran í Sunda kommunu.

- Síðan verður málið lagt aftur fyri bygdaráðið til endaliga støðutakan, sigur kommunuskrivarin at enda.